

## Norðurkorea svarar aftur

Norðurkorea tekur seg burtur úr samráðingunum um landsins kjarnorkuætlanir og vil ikki loyva ST-eftirlitsmonnum at kanna kjarnorkustøðirnar. Norðurkoreanska stigið er ein avleiðing av, at ST-trygdarráðið einmælt fordømdi ta seinastu norðurkoreonsku rakettroyndina, tí hon var brot á eitt ST-forboð. Í gjár kunngjørdi almenna tíðindastovan KCNA, at Norðurkorea vil ikki halda fram við samáðingunum við Suðurkorea, Japan, Kina, Russland og USA um landsins kjarnorkuætlanir, og nú hevur Altjóða Kjarnorkustovnurin fingið boð um at taka síni eftirlitsfólk úr landinum sum skjótast. Í Washington sigur talsmaðurin hjá Hvítu Húsunum, Robert Gibbs, at Norðurkorea má halda altjóða samtyktir og reglur og virða viljan hjá altjóða samfelagnum.

## Sjálfstæðisflokkurin veksur

Sjálfstæðisflokkurin, sum í mong ár var tann størsti í Íslandi, tykist fáa altsamt fleiri veljarar, nú altingsvalið nærkast. Tann seinasta meiningakanningin vísir, at var valið nú, hevði flokkurin fingið 27,3 prosent av atkvøðunum, og tað er trý prosentstig meiri enn fyri bara einari viku síðani. Samfylkingin er kortini tann størsti flokkurin og hevði sambært kanningini fingið 32,2 prosent, var valið nú. Hin stjórnarflokkurin, Vinstri grønir, hevði fingið 25,7 prosent, og sostatt fáa teir báðir stjórnarflokkarnir stuðul frá 57,9 prosentum av veljarunum.

# Tjaldrið rakt av salmonella

**Meira enn helmingurin av manningini umborð á vaktar-og bjargingarskipinum Tjaldrinum varð herfyri rakt av salmonella. Støðan hjá tveimum teirra gjørdist so trupul, at teir endaðu á sjúkrahúsi. Samskiparin á Fiskiveiðieftirlitinum, Jóannes í Heimistovu, sigur, at teir standa púra spyrjandi, hvussu hetta kann vera hent**



*- Eg trúgvi, at tað verður trupult at finna fram til neyvu orsøkina til salmonella-smittuna, tá menn onga hóming hava av, hvaðani orsøkin stavar. Vit hava havt ein avloysara umborð á Tjaldrinum sum kokkur, og vit hava fult álit á hesum manni, ið annars starvast sum kokkur í landi, sigur Jóannes í Heimistovu, samskipari hjá Fiskiveiðieftirlitinum*

TJALDRIÐ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Síðan týsdagin 24. mars hava menn, sum sigla við vaktar- og bjargingarskipinum Tjaldrinum, verið fongdir við salmonella. Hendan dagin noyddust fýra mans sjúkir í land, fríggjadagin eftir fór hin fimti, og so aftur sunnudagin eftir noyddist eisini hin sætti maðurin í land sjúkur.

Við Tjaldrinum á hvørji skipsvakt – um vit kunnu kalla tað so - eru 11 mans, meðan 11 aðrir eru í landi. Hetta merkir, at meira enn helmingurin av manningini frá týsdegi til sunnudag noyddist av skipinum, tí teir kendu seg sjúkar.

Hinir, ið eftir vóru og eisini teir, sum høvdu verið umborð saman við teimum seks, sum gjørdust sjúkir, vórðu ongantíð raktir. Nú er so ein tíð fráliðin, síðan tann seinasti fór í land, sunnudagin, 29. mars, og einki hevur verið at merkt síðan.

### Stórt spurnartekin

- Í fyrstuni vistu vit ikki, hvat var áfatt hjá hesum monnum, sum eisini vístu seg at vera ymiskt raktir. Summir vóru verri fyri, meðan aðrir ikki vóru líka illa fyri, og eisini vóru sjúkufyribrigdini ymisk.

Tað sigur Jóannes í Heimistovu, samskipari hjá Fiskiveiðieftirlitinum, sum eitt nú hevur manningarviðurskifti umborð á Tjaldrinum og Brimli undir sær.

Hann vísir á, at nógv hevur verið tosað um, hvør orsøkin kundi vera til, og menninir umborð á Tjaldrinum gjørdust sjúkir.

- Í fyrstani vistu vit ikki, hvat bagdi monnunum, men sum tíðin er liðin, hava nakrir teirra fingið staðfest hjá lækna, at teir eru fongdir við salmonella. Tað er tí alt, sum bendir á, at teir allir eru vorðnir fongdir við salmonella.

Hann sigur, at í fyrstani ljóðaði, at menn umborð á onkrum øðrum skipi eisini vóru vorðnir sjúkir, men at hetta helst bara hevur verið vanligt krím.

Jóannes sigur, at einir tveir av manningini á Tjaldrinum, sum soleiðis noyddust í land, gjørdust so illa fyri, at teir endaðu á sjúkrahúsi.

### Drekkivatnið kannað

- Bæði millum menninar, sum eftir vóru umborð og teir, sum gjørdust fongdir við salmonella, hevur nógv verið tosað um, hvør orsøkin til tilburðirnar kundi vera, men nú tíðin er fráliðin, standa vit framvegis líka spyrjandi.

Samskiparin sigur, at tað fyrsta teir gjørdu eftir, at menninir vóru farnir sjúkir í land, var at biðja Heilsufrøðiligu Starvsstovuna kanna drekkivatnið umborð.

- Tá hesar kanningar vórðu gjørdar, varð ikki endaliga staðfest, at menn vóru fongdir við salmonella. Tveir vatntangar og ein vatnkølari eru umborð á Tjaldrinum, og Heilsufrøðiliga Starvsstovan kannaði vatnið í hesum fyri ecolibakteriu. Kanningarnar vístu ikki, at henda bakteria fanst í drekkivatninum umborð.

Jóannes í Heimistovu vísir á, at tá slíkar kanningar verða gjørdar, vil Heilsufrøðiliga Starvsstovan helst hava okkurt "clue" um, hvat leitast skal eftir, so kanningarnar ikki gerast óneyðuga umfatandi.

- Hóast Heilsufrøðiliga Starvsstovan seinni hevur fingið at vita, at menn umborð vóru fongdir við salmonella, ivist eg í, um orsøkin verður at finna í vatninum, leggur hann aftrat.

### Álit á kokki

Samskiparin væntar, at tað fer at vera trupult at finna fram til neyvu orsøkina til smittuna, tá menn onga hóming hava av, hvaðani orsøkin stavar.

- Vit hava havt ein avloysara umborð á Tjaldrinum sum kokkur, og vit hava fult álit á hesum manni, ið annars starvast sum kokkur í landi.

Jóannes í Heimistovu heldur, at onkusvegna má orsøkin til salmonella-smittuna finnast í onkrum, sum er etið umborð, men at tað helst verður trupult at staðfesta, hvat hetta er.

- Fyribils hava vit funnið okkum í, at hetta helst er okkurt, sum er komið á borðið – og síðan er farið av aftur borðinum og afturvið aftur. Sum eg havi skilt, er eingin reyður tráðu, sum hevur leitt manningina fram til orsøkina til tilburðirnar. Síðan hesar tilburðir, hevur einki verið at merkt aftur, sigur samskiparin hjá Fiskiveiðieftirlitinum

Enn í dag eru ikki allir menninir, sum gjørdust fongdir við salmonella umborð á Tjaldrinum, vorðnir frískir aftur, men teir flestu eru komnir rímiliga væl fyri seg aftur.